# út at koyra



## Daimler-Chrysler

Chrysler er nú ein partur av Daimler-Chrysler, eins og bilmerkini Dodge, Jeep og Plymouth. Dodge og Plymouth býta plattformar og komponentar.

**Kelda: Bilen Motor & Sport**



## Óttast GM og Fiat samstarv

Samstarvið millum GM og Fiat hóvar ikki starvsfólkunum hjá Opel í Týsklandi. Tey óttast, at bilarnir koma at brúka felags plattformar, og tey harvið koma at missa arbeiðspláss.

**Kelda: Motor Magasinet**

## Ætlar ikki uttanlands

Leiðslan hjá Opel í Týsklandi hevur sissa starvsfólkini, og boðar frá at teir ikki hava ætlanir um at flyta partar av framleiðsluni uttanlands, í samband við GM og Fiat samstarvið.

**Kelda: Motor Magasinet**

## Stutt tíðindi frá Ferðslutrygd:

### Nýggja ferðslulógin í Løgtingið

Fríggjadagin 25. február varð nýggja ferðslulógin endaliga avgreidd úr landsstýrinum til løgtingið, aftaná drúgva viðgerð í Vinnumálastýrinum. Nýggja ferðslulógin umfatar 8 størri broytingar í mun til galdandi ferðslulóg, harundir nýggjar ásetingar um promillu- og rúsdrekkakoyring og revsimarkið í hesum sambandi, og eitt nú broytingar í lógini um trygdarbelti og nýtslu av fartelefonum í bili.

### Løgreglan í Føroyum á Alnótina

Eftir at arbeitt hevur verið við málinum í langa tíð hevur Føroya landfúti nú lagt eina heimasíðu fyri løgregluna í Føroyum út á Alnótina. Síðan, www.politi.fo , inniheldur upplýsingar um politistøðirnar í Føroyum, upplýsingar um pass, koyrikort, skjótiloyvi og ferðslulógina m.a., eins og upplýsingar eru, um hvussu ein kann gerast løgreglumaður/kvinna. Harafturat er ársfrágreiðingini hjá løgregluni við, umframt galdandi ferðslulóg. Allar upplýsingar á síðuni eru á donskum.

### Minnist til reyða kortið

Longu seinast í február mánaði hevði danska løgreglan steðgað hópinum av leigubilum við markið millum Týskaland og Danmark. Hetta vóru bilar, sum tryggingarfeløg høvdu útvegað sum umbýtisbilar, men sum ikki høvdu loyvi at koyra í Danmark. Mælt verður øllum føroyingum, sum fara uttanlands at koyra við skrokktryggjaðum bili, at útvega sær reyða SOS-kortið, sum fæst ókeypis. Henda trygging tryggjar, at ein fær ein umbýtisbil, sum ein kann koyra líka til hús aftur við. Av praktiskum orsøkum verður tó mælt til at seta bilin í t.d. Hanstholm, so svarar tryggingin fyri teimum eykaútreiðslum, ein annars hevur av at koma sær til hús. Tryggingin tekur við, um bilurin verður stolin, ella so illa skaddur, at tað tekur meira enn 3 dagar at umvæla hann.

### Endurskin møguliga kravt við lóg

Fólk til gongu gera ofta tað mistak at halda, at tá tey síggja bilarnar, so síggja bilførararnir eisini tey. Men serliga á vetrartíð kann tað vera ógjørligt hjá bilførarum at síggja fólk til gongu, um hesi ikki nýta endurskin. Hinvegin síggjast endurskin umleið 140 metrar, um førarin bara hevur nærljósini tendraði, og upp til 400 metrar, um fjarljósini eru tendraði.

### 18 koyra ávirkaði í Føroyum hvønn dag

Norðurlendsk kanning vísir, at av hvørjum 1000 bilførarum koyra 3 við meira enn 0.5 promillu í blóðinum. Umleið 18-19.000 bilar eru í Føroyum. Lat okkum siga, at umleið ein triðingur er á vegunum samstundis ein vanligan arbeiðsdag, ella á leið 6.000. Hetta svarar til, at ein vanligan gerandisdag í Føroyum eru 18 bilførarar í ferðsluni, sum hava meira enn 0,5 alkoholpromillu í blóðinum. Býta vit hetta eftir samlaða bilatalinum í mun til fólkatalið, vildu seks koyrt í Havn, tveir í Klaksvík, fýra í Eysturoy, ein til tveir í Norðurstreymoy, ein í Vágum, ein í Sandoy og ein til tveir í Suðuroy.

### Fjórða hvør álvarsliga vanlukka orsakað av rúsdrekka

At 3 av 1000 bilførarum koyra ávirkaðir ljóðar kanska ikki av tí nógva, men verður hugt at teimum vanlukkum, sum føra við sær deyða ella álvarsligan løst, so er fjórða ella fimta hvør vanlukka orsakað av rúsdrekka. Sereyðkenni fyri ferðsluvanlukkur, sum henda av rúsdrekka eru: at tær henda um náttina, at tær henda í vikuskiftinum, at talan er um álvarsamar vanlukkur, at bara ein bilur er uppi í, t.e. bilurin hjá tí drukna bilføraranum, at serliga ungir menn hava skuldina, og at bilførarin ikki nýtir bilbelti. Í Norðurlondum hevur meira enn 3. hvør, sum er mistonktur fyri rúsdrekkakoyring, brúkt onnur rúsandi evni ella heiluvág einsamalt ella saman við rúsdrekka.

## BMW nýggjan ráðharrabil



BMW 700, ið er ein væl umtøktur ráðharrabilur. kemur í nýggjari útgávu í 2001 ella 2002.

Hetta verður ein stórur bilur við øðrvísi og aggressivum linjum.

Motorarnir verða teir somu sum í núverðandi modellum. Prísin vita vit av góðum grundum onki um.

**Kelda: FDM / Motor**

## MAN Trucknology Generation, TG-A



*Magnus Gunnarsson*

MAN er ein gomul maskinverksmiðja, sum varð sett á stovn í tveimum støðum um somu tíð, í Augsburg í 1840 og í Nürnberg í 1841. Harav kemur navnið MAN, ið stendur fyri Maschinenfabrik Augsburg-Nürnberg.

MAN framleiðir maskinur til prentsmiðjur, elevatorar, stálkonstruktiónir og stóru skipsmotorarnar MAN-B&W.

Fyrsti MAN lastbilur varð framleiddur í 1915, og umframt lastbilar gera teir bussar og aðrar specialbilar.

### Skivubremsur á øllum hjólunum

Síðst í mars mánaði kom tann nýggjasti MAN TG-A á markaðin. Bilurin fæst við tveimum motorum við 410 og 460 hk, seinni koma tveir minni við 310 og 360 hk.

Um ein bilur hevur t. d. 460 hk eitur hann TG 460A. Bilurin hevur elegant design, og komforturin er í toppklassa. Førarahúsið og foraksulin eru luftavfjaðrað. Hann hevur ABS bremsur við EBS og EDS og skivubremsur á øllum hjólunum.

Við nýggja 16 trins ComfortShift gearkassanum ber til at skifta gear uttan at brúka koblingina ella sleppa speedaranum. Eisini fæst hann við einum automatiskum 12 trins MAN TipMatic gearkassa, ið er gjørdur til at avlasta bilføraran og betrar um oljunýtsluna.

Umboð fyri MAN bilarnar í Føroyum er Kjartan Simonsen, Jørundsgøta 39 í Klaksvík.



# út at koyra




*Tvær útgávur eru at velja í, hvat útgerð viðvíkur, Comfort og Elegance, og tríggir motorar eru at velja ímillum, 1.5 l og 1.8 l bensinmotorar og 2,2 turbo diesel við beinleiðis innspræning*

**Mynd: Jens Kristian VAng**

## Almera, ein gjøgnumførdur bilur frá Nissan

*Magnus Gunnarsson*

Nissan Almera er teknaður og framleiddur í Europa. Málið hjá Nissan viðvíkjandi Almera, var at bilurin skuldi hava eins góðar koyrieginleikar, sum Peugeot 306. Hetta hevur eyðnast væl, og bilurin hevur gott vegtak og koyrir sum ein dreymur.

### Sum at koyra ein franskan bil

Bilurin er faktist nýggjur, og lítið ella einki er eftir av tí gamla bilinum við sama navni. Alt er eisini gjørt fyri, at Almera skal fáa størri part av bilmarknaðinum. At kvaliteturin er á høgum støði merkist við at seta seg inn í bilin og á ljóðinum, tá ið hurðarnar verða lætnar aftur.

Eitt lið av verkfrøðingum og testkoyrarum hava arbeitt intenst við at fínstilla koyrieginleikarnar á Almera við serligum atliti til róðurgreiðir og fjaðraskipan. Hetta hevur eisini givið úrslit, tí bilurin koyrir sera væl í allar mátar og er sum ein franskur bilur at koyra.

### Nógv gjørt við trygdina

Tvær útgávur eru at velja í, hvat útgerð viðvíkur, Comfort og Elegance, og tríggir motorar eru at velja ímillum, 1.5 l og 1.8 l bensinmotorar og 2,2 turbo diesel við beinleiðis innspræning, sum er størsti dieselmotorurin í hesum klassanum.

Tað at Almera vigar næstan tað sama sum tann størri Primera kemst av, at tað er gjørt so nógv burturúr aktivu og passivu trygdini.

Setrini eru góð, og lætt er at seta seg tilrættis við fleiri møguleikum at stilla rættið og setrið. Instrumentborðið er væl gjørt og lætt at lesa av.

### Kemur seinni sum MPV

Nissan Almera er vælútgjørdur við nógvari standardútgerð, so sum servostýring, 4 airbag, aktivar nakkapútur, ABS bremsur við EBD og NBA skipan, hátrýstspulara til forlyktirnar, sentrallás, pollenfiltur, el-síðurútar, el-síðuspegl við hita og stereoradio við 4 hátalarum.

Bilurin fæst einans við 5 hurðum í løtuni, men seinni í ár kemur hann við 3 hurðum og sum sedan. Eisini kemur Almera Tino, ið er ein MPV útgáva.

Almera verður framleiddur á Nissanbilaverksmiðjuni í Sunderland í Onglandi — á somu verksmiðju sum Micra og Primera.





## Nissan Almera 1.8 Elegance

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1.8 l 4 syl. |
| 16V 114 hk | |
| 0-100 km/t | 11.1 sek. |
| Bensinnýtsla (blandað koyring) | 13.3 km/l |
| Dekkstødd | 185/65-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 418.4 cm |
| Breidd | 170.6 cm |
| Hædd | 144.2 cm |
| Eginvekt | 1225 kg |
| Lastar | 500 kg |
| Viðførisrúm | 355 litrar |
| Prísur | 168.000 |
| Aðrar útgávur | |
| 5 Comfort 5/h | 149.000 |
| 1.5 Elegance 5/h | 158.000 |
| 1.8 Comfort 5/h | 158.000 |
| 2.2 TD Comfort 5/h | 185.000 |

**Søluumboð**
**P/F Meinhardt Arge**
**Falkavegur**
**FO-110 Tórshavn**

P/F Meinhardt Arge